Umhvørvismálaráðið

Dagfesting:	23.01.2024
Mál nr.:	23/06558-43
Málsviðgjørt:	HE
Ummælistíð:	10.-27.11.2023
Eftirkannað:	28.11.2023

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina

§ 1. Landsstýrisfólkinum verður heimilað at menna barsilsskipanini eina nýggja kt-skipan.
Stk. 2. Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 11 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Barsilsskipanin verður í dag umsitin av TAKS. Verandi kt-skipan byggir á eina gamla, stirvna og ólagaliga mannagongd. Kt-skipanin hevur fleiri umsóknarskjøl – t.e. fysisk skjøl – sum skulu fyllast út, skrivast undir av fleiri pørtum og sendast barsilsskipanini.

Seinastu trý árini eru gott og væl 650 børn fødd um árið í Føroyum. Fyri hvørt føtt barn eru vanliga tvey foreldur, heilsustarvsfólk og í minsta lagi tveir arbeiðsgevarar, sum á ein ella annan hátt eru knýtt at barsilsskipanini í barsilstíðini. Í barsilstíðini kunnu foreldur flyta barsil ímillum sín, og hetta ávirkar eisini arbeiðsgevarapartin. Tíðarskeiðið, har partarnir eru knýttir at barsilsskipanini, er avmarkað fyri hvørt føtt barn. Tað merkir, at skarin, sum er knýttur at barsilsskipanini, skiftir alla tíðina. Mett verður, at verða 650 børn fødd eitt ár, eru meira enn 9.000 handfaringar í kt-skipanini, um umsóknargongdin gongur væl. Men ofta eru villur í umsóknunum. Tá er nógv samskifti millum umsøkjaran og barsilsskipanina, har fysisku skjølini verða send aftur og fram millum partarnar fyri at tryggja, at umsóknin er fullfíggjað, áðrenn endalig støða verður tikin til barsilsútgjaldið. Hetta er ein ólagalig mannagongd, sum hevur óneyðuga drúgva málsviðgerðartíð við sær.

Barsilslógin er broytt fleiri ferðir. Tá ið verandi kt-skipan verður tillagað til lógarbroytingar, hevur tað meirkostnað við sær og krevur servitan um kt-skipanina. Verandi kt-skipan er so mikið gomul, at um heilt fá ár er servitanin um kt-skipanina ikki tøk longur. Vantandi servitan um kt-skipanina fer at hava avbjóðingar við sær í framtíðini, tí tað fer at gerast alt truplari at dagføra verandi skipan til lógarbroytingar. Nevnast skal eisini, at ásett er í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu, at barsilsskipanin skal gerast smidligari, eitt nú skulu foreldur betur kunna leggja barsilstíðina til rættis eftir egnum ynski og tørvi. Uppskotið gevur góðar møguleikar fyri at endurskoða og fremja broytingar í barsilsskipanini frameftir, sum kunnu fevna um:

- longdina á barsilstíðarskeiðinum, sum foreldur kunnu fáa barsilspening samstundis,
- smidligheitina á útgjaldinum, og um foreldur skulu hava valmøguleikan at fáa lutfalsliga meiri ella minni í útgjaldi við antin at stytta ella leingja sítt barsilstíðarskeið
- hámarkið, og hvørt tað skal hækkast ella ikki
- eitt møguligt lógarásett lágmarksútgjald

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða tiknir við upp á ráð í sambandi við endurskoðanina av barsilsskipanini. Fleiri broytingar í barsilslógini eru tí í væntu í næstum. Nýggja kt-skipanin skal lættliga kunna tillagast til broytingar, sum kunnu væntast í sambandi við endurskoðanina av barsilsskipanini.

Við vantandi servitan um verandi kt-skipan um stutta tíð, samstundis sum tillagingar í verandi kt-skipan hava meirkostnað við sær, er ikki skynsamt at halda fram at gera ábøtur á verandi kt-skipan. Tað er meira skynsamt at útvega eina nýggja kt-skipan, sum lættliga kann lagast til væntaðu lógarbroytingar.

Ein onnur orsøk til at menna eina nýggja kt-skipan er, at við verandi kt-skipan hevur barsilsskipanin ikki atgongd at heinta hagtøl. Dátugrundarlagið liggur hjá einum uttanhýsis

veitara, og tí verða hagtalsgreiningar gjørdar gjøgnum veitaran. Hetta ger hagtalsgreiningarnar óneyðuga dýrar.

Aftur at hesum fylgja barsilsútgjaldið og vanligar lønarútgjaldingar ikki sama útgjaldingarmynstri. Bæði útgjøldini vera goldin afturút, men meðan lønir vanliga verða útgoldnar síðst í hvørjum mánaði, verður barsilsútgjaldið útgoldið fyrst í hvørjum mánaði. Ónøgd er um, at barsilspeningurin ikki fylgir vanliga løngjaldingarmynstrinum, tí hetta hevði hóskað betur til vanligar fastar mánaðarligar útreiðslur sum til dømis skuldaravdrátt. Við nýggju kt-skipanini verður latið upp fyri, at barsilsgjaldið betur fær fylgt vanliga lønargjaldingarmynstrinum.

Mett verður, at stórur tørvur er á at menna barsilsskipanini eina nýggja kt-skipan, og arbeiðið eigur at fara í gongd skjótast gjørligt, so at tað slepst undan óneyðugum útreiðslum av at tillaga gomlu kt-skipanina. Umframt at verða meira brúkaravinarlig hjá øllum pørtum verður nýggja kt-skipanin lættari at umsita. Málsviðgerðartíðin styttist, útgjaldsvillurnar fækka, servitanin verður tryggjað, so at kt-skipanin lættliga kann lagast til framtíðarbroytingar í barsilslóggávuni, hagtalsgreiningarnar verða neyvari og bíligari, og barsilsútgjaldið fer at hóska betur til vanliga lønargjaldingarmynstrið.

1.2. Galdandi lóggáva

Barsilsskipanin er regulerað í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan (barsilslógini) og kunngerð nr. 91 frá 31. mai 2001 um umsiting av Barsilsskipan. Til at umsita barsilsskipanina varð ein kt-skipan ment fyrst í 00'unum, sum bygdi á eitt grundarlag úr 1980'unum.

TAKS umsitur barsilsskipanina. Dáturnar í skipanini liggja hjá einum uttanhýsis veitara, og tí mugu hagtalsgreiningar gerast gjøgnum veitaran.

Síðani barsilslógin varð sett í gildi í 2001, er hon broytt 18 ferðir. Higartil eru tillagingar gjørdar í verandi kt-skipan, tá ið broytingar í lógini hava kravt tað. Tillagingar verða gjørdar fyri meirkostnað, og tað gerst alsamt truplari at gera tillagingar í verandi kt-skipan, sum er gomul og stirvin, samstundis sum servitanin um kt-skipanina ikki verður tøk um heilt stutta tíð.

Ónøgd er um, at barsilsgjaldið ikki verður útgoldið, tá ið lønir vanliga verða útgoldnar, tí onnur gjøld, eitt nú skuldaravdráttir, verða kravd inn síðst í hvørjum mánaði.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at útvega materiella heimild til at menna eina nýggja og meira talgilda kt-skipan at umsita barsilsútgjaldið við. Nýggja kt-skipanin verður meira brúkaravinarlig hjá øllum pørtum, og borgarin fær eina betri tænastu, samstundis sum kt-skipanin verður lættari at umsita. Nýggja kt-skipanin verður løtt at tillaga til væntaðar framtíðarbroytingar á barsilsøkinum. Umframt hetta fær barsilsskipanin betri atgongd at dátum, so at til ber at gera betri og bíligari hagtalsgreiningar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við nýggju kt-skipanini verður barsilspeningurin útgoldin við eini talgildari sjálvgreiðslu. Sjálvgreiðslan verður ment við støði í einum "mobile first"-sjónarmiði. Tað merkir, at hon skal

optimerast til umsóknir við snildfon, har partar kunnu endurnýtast og tillagast til eitt nú teldil og telduskíggja.

Eftir innritan stovnar sjálvgreiðslan eina í mestan mun sjálvvirkna talgilda umsókn. Neyðugar upplýsingar, ið eru atkomandi í øðrum almennum skipanum, verða nýttar sjálvvirkið. Útrokningar kunnu gerast sjálvvirkið. Kt-skipanin letur upp fyri, at broytingar kunnu gerast í útgjaldingargrundarlagum, eitt nú, at partur av barsilstíðini verður fluttur millum foreldrini. Verða rættingar ella broytingar gjørdar – antin av einum málsviðgera ella einum borgara – tillagar kt-skipanin sjálv útrokningar og útgjøld og setur hesi í verk. Nýggja kt-skipanin ger tað sostatt smidligari hjá foreldrum at flyta barsilstíð ímillum sín – eisini í barsilstíðini.

Arbeiðsgevarar kunnu talgilt vátta barsilsfráveru og søkja um endurrindan. Arbeiðsgevarar fáa møguleika at stovna umsóknartilgongdina. Arbeiðsgevarar við egnum lønarskipanum kunnu senda upplýsingar inn beinleiðis úr síni skipan.

Leypandi eftirlit verður havt sjálvvirkið. Møguleiki verður eisini fyri manuellum eftirliti.

Simuleringar og hagtøl kunnu gerast beinleiðis í umsitingarskipanini. Tað verður tí ikki neyðugt at taka ein uttanhýsis veitara við í málið, tá ið hagtøl skulu fáast til vegar ella framrokningar skulu gerast.

Útrokningarvariablar kunnu broytast uttan stórvegis tøkniligan førleika. Hetta gevur betri reaktiónsevni, tá ið ræður um broytingar í kt-skipanini, sum m.a. kunnu vera neyðugar í sambandi við lógarbroytingar.

Væl lættari og effektivari verður hjá bæði borgarum, vinnu og umsiting at umsita rættindi og skyldur í sambandi við barsilsfarloyvi. Barsilsútgjaldið verður ætlandi útgoldið síðst í mánaðinum, eins og vanligt er við lønum, og hesa broytingina fer nýggja kt-skipanin at megna.

Eisini verður lættari at handfara framtíðarbroytingar í barsilsfarloyvislóggávuni.

Teknisk viðurskifti
TAKS hevur dátugoymslu (datawarehouse) sum barsilsdáturnar verða partur av. Talan er um eina fakskipan, har servitanin liggur innanhýsis hjá TAKS. Tí skal skipanin mennast tætt upp at vitanini hjá málsviðgerunum. Hetta gevur m.a. møguleika fyri neyvum rapportum.

Kt-skipanin verður knýtt at Borgaraglugganum og Vinnuglugganum hjá TAKS, so at til fer at bera at rita inn á hesar báðar sjálvgreiðslurnar. Bæði borgarar og vinnan brúka frammanundan hesar sjálvgreiðslurnar til onnur viðurskifti. Talan er sostatt um kendar sjálvgreiðslur, har nýggja kt-skipanin fyrst og fremst verður brúkt til innritan. Viðmerkjast skal kortini, at landið hevur ment pallin Talgildu Føroyar, sum eftir ætlan skal vera bulurin í øllum borgara- og vinnuvendum tænastum. Arbeitt verður tí við møguleikanum at knýta nýggju kt-skipanina í Vangan og Virkisvangan, sum væntandi verður tøkur í næstum.

Til verandi talgilda undirstøðukervi hjá Talgildu Føroyum hoyra m.a. Samleikin, Heldin og virkisskráin. Fyri at hava betri støðufesti og trygd samskifta skipanir hjá TAKS í útgangsstøðinum sínámillum innanhýsis, meðan alt annað, eitt nú samskifti millum stovnar, fer fram gjøgnum Heldina, Samleikan o.s.fr.

Ætlanin er at menna sjálvvirkna innheintan av so nógvum atkomandi dátum sum gjørligt og knýta í loysnir hjá Talgildu Føroyum. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at tey ymsu krøvini eru lokin, og at reaktiónstíðin er stutt.

Fyri at gera umsóknartilgongdina so einfalda, sum til ber, er talgild undirskrift vald frá í fyrsta umfari. Til ber at staðfesta samleikan hjá borgaranum, sum søkir, tá ið ritað verður inn við Samleikanum. Møguliga skulu arbeiðsgevarar brúka talgilda undirskrift.

Knýtingina millum foreldur og børn hava vit longu í verandi Barsilsskipan, men hon verður gjørd betri við nýggju kt-skipanini. Útgjaldingarmannagongdin verður tann sama sum í dag. Møguligar broytingar í hesum viðurskiftunum verða gjørdar í samstarvi við Gjaldstovuna.

Ein betri og meira sjálvvirkin kt-skipan fer at minka um villurnar. Kt-skipanin fer at tryggja arbeiðsgevarum góðar møguleikar fyri samspæli við egnar lønarskipanir gjøgnum nettænastu (webservice).

Ætlanin er at endurskoða bókhaldspartin av barsilsskipanini sum part av verkætlanini at menna nýggja kt-skipan. Tá ið bókhaldsparturin er endurskoðaður, verður avgerð tikin, um hann skal tvinnast saman við bókhaldsskipanina hjá TAKS ella koyra fyri seg, sum hann ger í dag. Ætlanin er ikki at broyta bókhaldsleistin ella markamótið móti Gjaldstovuni – uttan so at Gjaldstovan vil tað.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Hesi hava havt uppskotið til ummælis:

- Vinnuhúsið
- Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF)
- Samtak
- Fakfelagssamstarvið
- TAKS

Uppskotið hevur harafturat ligið til almenna hoyring á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum.

Vinnuhúsið hevur vegna KT-felagið viðmerkt, at KT-felagið yvirskipað tekur undir við uppskotinum.

Eingi onnur ummælisskriv eru móttikin.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
TAKS, sum hevur ment fleiri talgildar loysnir, metir, at tað tekur tvey ár at menna eina nýggja kt-skipan til barsilsútgjald. Arbeiðið er boðið út, og við støði í innkomnu tilboðunum er prísurin fyri kt-skipanina 11 mió. kr. tilsamans. Barsilsgrunnurin ber kostnaðin. Eftir ætlan verða slakar 6 mió. kr. brúktar til kt-skipanina í 2024 og góðar 5 mió. kr. í 2025.

Talan er um eina nýggja kt-skipan, sum loysir eina aðra kt-skipan av, og sum TAKS heldur við líka og umsitur. Rakstrarsparingar vera, tí málsviðgerðin verður meira effektiv. Sum frá líður, fer væntandi at bera til at effektivisera raksturin av barsilsskipanini upp aftur meira við nýggju kt-skipanini.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur gagnligar umsitingarligar avleiðingar fyri landið, við tað at umsitingin av barsilsútgjaldinum verður smidligari við nýggju kt-skipanini.

Ilt er at meta um, hvørjar sparingar ein nýggj kt-skipan kann væntast at hava við sær. Men við tí í huga, at einar 9.000 handfaringar eru í kt-skipanini um árið, samstundis sum skarin, sum er knýttur at kt-skipanini, støðugt skiftir, verða rakstrarsparingar á umsitingarøkinum, tá ið farið verður frá verandi kt-skipan við fysiskum skjølum til eina smidligari talgilda kt-skipan, har til ber at rita inn við sjálvgreiðslu.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur gagnligar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna, tí tað verður m.a. lættari at vátta barsilsfráveru og søkja um endurrindan. Vinnan kann tí vænta minni umsiting í sambandi við barsil frameftir.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur gagnligar avleiðingar fyri løntakarar, sum eru knýttir at barsilsskipanini. Kt-skipanin verður meira brúkaravinarlig, og løntakarin fær eina betri tænastu.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd er viðkomandi fyri barsilsskipanina. Uppskotið er ikki í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd, tí uppskotið hevur onga broyting við sær við atliti at sambandinum millum barsilslógina og sáttmálan um almannatrygd.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í ósamsvari við hoyvíkssáttmálan, evropeiska mannarættindasáttmálan og sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Viðvíkjandi evropeiska mannarættindasáttmálanum kann upplýsast, at nýggja kt-skipanin fer at lætta um privat- og familjulívið, við tað at løntakarar fáa eina betri tænastu við lagaligari mannagongdum og eini smidligari kt-skipan, sum ger tað lættari at gera broytingar undir barsilstíðini.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólki, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at nýta upp í 11 mió. kr. til at menna eina nýggja kt-skipan til barsilsútgjald. Barsilsgrunnurin ber kostnaðin.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn. Við samtykki frá einum løntakara kann kt-skipanin sjálvvirkandi heinta tær privatu upplýsingarnar um løntakaran, sum krevjast til at viðgera eina umsókn um barsilsútgjald. Kortini kann leggjast afturat, at talan er um upplýsingar, sum umsøkjarin í dag skal upplýsa í umsóknarskjalinum. Talan er ikki um, at myndugleikin fær atgongd at øðrum persónligum upplýsingum enn teimum, sum í dag verða brúktar til at viðgera eina umsókn um barsilsútgjald.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Umframt omanfyri nevndu avleiðingar fer lógaruppskotið at gera tað lættari og smidligari at gera tillagingar í kt-skipanini, tá ið broytingar í framtíðini verða gjørdar í galdandi lóggávu.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Eftir uppskotinum verður heimilað landsstýriskvinnuni at gera neyðugar avtalur um eina nýggja kt-skipan til barsilsútgjald.

Hetta er ein materiell heimild, og av tí at ætlanin hevur við sær útreiðslur tvey fylgjandi fíggjarár, er neyðugt at útvega játtan fyri hvørt árið sær til útreiðslurnar í tí árinum. Barsilsgrunnurin fíggjar nýggju kt-skipanina. Arbeiðið er boðið út, og við støði í innkomnu tilboðunum er prísurin fyri kt-skipanina 11 mió. kr. tilsamans. Eftir ætlan verða slakar 6 mió. kr. brúktar til kt-skipanina í 2024 og góðar 5 mió. kr. í 2025.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Lógin kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2027.

Eftir ætlan fer arbeiðið í gongd fyrst í 2024. TAKS metir, at arbeiðið tekur tvey ár, og tí verður væntað, at arbeiðið verður liðugt fyrst í 2026. Ymisk viðurskifti kunnu kortini gera, at arbeiðið byrjar seinni enn ætlað ella tekur longri tíð enn væntað. Fyri at tryggja, at arbeiðið kann gerast liðugt hóast møguligar seinkingar, er ásett, at lógin skal vera galdandi alt 2026.

Umhvørvismálaráðið, 23.01.2023

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Ummælisskriv frá Vinnuhúsinum vegna KT-felagið
Fylgiskjal 2: Útboðstilfar til kt-skipan til barsilsskipanina
Fylgiskjal 3: Spurningar og svar til útboðstilfar